# Føroyskar filmssøgur



*Ein røð av einastandandi søguligum filmsupptøkum úr Føroyum verða at síggja í Miðlahúsinum á ólavsøku*

**Tey, ið vitja Miðlahúsið á ólavsøku, fáa eitt serstakt høvi at síggja útvald brot úr filminum »Føroyskar Søgur«, ið er størsta mentanarverkætlanin av sínum slag nakrantíð í Føroyum**

## Mentan

**Jan Müller**
jan@sosialurin.fo

Tú kennir tað aftur - tá smalfilmarnir verða støvaðir av. Hoppandi myndir av fyrsta túrinum á nýggju súkkluni, lítilbeiggi við gelebeinum í gangiseðlum og landsdystinum móti íslendingum á ólavsøku í '59 - tað vekir eina heilt serliga kenslu.

Hendan kensla er grundarsteinurin í »Føroyskum Søgum«, ið er nýggj DVD-útgáva um føroyingar, og hvussu fólk hava livað og virkað á hesum veðurbardu klettum seinastu 100 árini - bæði tá tað gekk við og ímóti. Yvir 90 minuttir við einastandandi søguligum filmsupptøkum eru útvaldir og skiftir millum ellivu sjálvstøðugar kapittlar um stórar og smáar tilburðir, ið hava upptikið fólk og havt týdning fyri, hvussu vit liva í dag.

Á »Føroyskum Søgum« kunnu fólk gleða seg til at uppliva eitt nú mótasýning við undirklæðum og frekum náttkjólum í Hotel Føroyum á Kongabrúnni í Havn í 1966, kornskering í Húsavík í 1959, á veiði við hvalastingaranum Heyki í 1949 og nakað so forkunnugt sum ein fólkafund á Gøtueiði í 1930.

### Søgan vakt til lívs

»Føroyskar Søgur« verða útgivnar 19. september við undansýning í Sjónleikarhúsinum, men alla ólavsøkuna verða útvald brot úr filminum víst í Miðlahúsinum, har umboð fyri Substanz Nordisk Film, ið hevur framleitt »Føroyskar Søgur«, og Eik Grunnin, ið hevur fíggjað verkætlanina, eisini vera hjástødd at sjóseta framsýningina.

Uni Leitisstein Hansen hevur samskipað arbeiðið við verkætlanini, og sambært honum, hava føroyingar nakað at gleða seg til, nú »Føroyskar Søgur« eru á trappuni.

– Livandi myndir eru sterkasti miðilin, ið finst, tí tær skapa eina heilt serliga nærveru og uppliving hjá fólki, ið tað er ógjørligt at skapa við øðrum miðlum. Tað kennist snøgt sagt ómetaliga forkunnugt at síggja, hvussu tað sá út í Føroyum fyri 40, 70 ella 100 árum síðani, men eisini at uppliva teir føroyingar, ið vit einans kenna frá myndum og søgubókum, brádliga vekjast til lívs, staðfestir Uni Leitisstein Hansen.

### Hundraðtals fimsrullur

»Føroyskar Søgur« er tann størsta mentanarverkætlanin av sínum slag nakrantíð í Føroyum. Hundraðtals filmsrullur eru innsavnaðar undan væðingini hjá privatfólkum og fram úr søvnum og goymslum. Allar eru tær reinsaðar, spleysaðar og yvirspældar til eitt nýtt, framtíðartryggjað format, so